# dvard Munch - ljós og myrkur

ber heitið: Gamal maður í bøn. Svarthvíta prentið er bardagin millum ljósið og myrkrið ikki bert tað, men eisini ræðslan fyri myrkrinum, sum Edv. Munch strýddist við næstan alla ævi sína. Pápan hevur hann eisini málað sitandi, men tað er nakað dapurt og sorgarkent yvir hesum málningum.

Edvard Munch hevur bert rósandi orð um faðir sín, áðrenn mamman doyði. Hann kundi siga frá søgum og søgnum, ævintýrum og spøkilsissøgum sum fáur. Tá ið konan doyði, gjørdist hann "gamal". Edvard kundi ikki tosa við pápan eins og faðir og sonur áttu at gjørt. Vit kunnu eisini siga, at hann sum barn eisini misti pápan. Christian Munch leitaði sær troyst í Guðs orði og gjørdist ein hugtungur kristin, men hann var góður við síni børn. Tann áhaldandi bíbillesnaðurin hjá faðirinum setti seg sum dumba á sinni hjá børnunum: "Verið still, pápi lesur í Bíbliuni," varð javnan sagt heima.

Bíbliulesnaðurin, sjúka og deyði lá sum ein marra yvir barndómsheimið. Hesa marru royndi Edv. Munch at rista av sær við at mála málningar.

Mostirin, Karen Bjølstad, tók húsið upp á seg eftir deyða systur sína. Karin og Edvard vóru sum krókur og lykkja, so góð tey vóru í fyrstuni. Tey stóðu hvørt øðrum nær, serliga meðan systirin Sofie lá á sóttarsong. Hon doyði av teringi - lungnatuberklum. Tá var Edvard bert trettan ára gamal og hon bert fimtan ára gomul. Hetta neit fast, og helt hann lítið um, at pápin ikki kundi bjarga dóttur síni sum lækni. Og ikki gjørdist støðan betri, tá ið tær innarligu bønirnar um lekidóm ikki munaðu.

Gamli Munch fríggjaði til Karina, men hann fekk krakk frá henni. Tá ið tað um Edvard ráddi, helt hon stundum við pápanum. Munch helt tá, at hon var meira enn mostirin og húshjálpin í húsinum. Hetta skuffaði hann ikki so lítið, men hóast tað, var hon tann einasti persónurin í hansara lívi, sum hevði stuðlað honum at gerast listamaður.

## Munch málar mostrina

Tá ið Munch var um tjúgu ára aldur, teknaði hann ofta húsfólkið, men mostrina teknaði hann sjáldan, og tá ið hann letur hana vera við á eini tekning, sæst sjaldan andlit hennara. Tjúgu eitt ára gamal málar hann hana sitandi í einum ruggustóli sum eina unga kvinnu, hóast hon er 44 ár. Hon hyggur niður, svartklødd, og liggur nakað undranarvert og duldarfult yvir henni. Hon er í svørtum kjóla, gardinurnar eru svartar, meðan veggur og gólv glógva í døkkum og ljósum rustreyðum liti. Við oyrað á skuggasíðuni er ein lítil glóð í oyralippuni - ein oyraringur? Inn gjøgnum gluggan flýtur ljósið.

Hon er umgyrd av ljósinum, reivað inn í glóðheitan lit, sum er kærleiks og bardagaliturin.

Tær mjúku linjurnar, sum bera brá av bleiktrandi ljósdropum, fevna um mostrina eins og ein



**Christian Krogh:**
**Syk pike, 1880/81**
olje på lerret, 102 × 58 cm
Oslo, Nasjonalgalleriet

eymlig, kínandi kærleikshond. Hann torir ikki at hyggja inn í eygu hennara. Hon var bæði ein kærleikans kelda í listini hjá honum og góður stuðul. Listin er duldarfull, djúp og viðkvom sum hjá einari ungari kvinnu, og ofta er ilt at fáa samband við hetta eygnabráið í hesum bláa dýpi serliga hjá so viðkvæmari sál sum hjá Edv. Munch. Hóast tað er ljósið til steðar í myndini, ja , ein so lítil glóð, sum skyggir í einum oyraringi(?) eins og hjá Vermeer: Gentan við oyraringinum, sum er heimslist. Tað er hendan myndin eisini.

## Munch málar systrina Sophie

Tjúgu trý ára gamal málaði Edvard Munch myndina Sjúk genta.( hetta motiv málaði hann fleiri ferðir) Hetta er eitt farvæl til kæru systrina, Sophie, sum doyr, sum sagt, av teringi bert 15 ára gomul. Ja, meira enn tað. Hetta er ein skaldamynd, ein yrking, ein dreymur um deyðan.

Gentan situr í einum stóli og vendir andlitið móti ljósinum. Tað bleika andlitið, sum deyðin hevur sett síni fingramerki á, fer næstan sjónleyst yvir í dagslýsið. Tað er sett við bleikum, reyðum rípum, sum fara um hárið, og ein lítil, reyður blettur bleiktrar tætt við munnvikan. Mostirin situr við sóttarsongina við boygdum høvdi.- Nú er endi á øllum . Nú brast eygað. Tann sjúki er blivin eitt við ljósið!

Myndin er málað í doyvdum, gráum og grønum litum. Strokini veita ein linna í málninginum, og tað er næstan soleiðis, at tú følir strokini meira enn tey síggjast. Myndin er friðsom og frígjørd. Hon er meira enn litir og linjur. Hetta vóru tónar, ein yrking og ein vónarinnar dreymur. - Av jørð er tú komin, og til ljós skalt tú verða.

## Munch málar Melankoli

Tann stóra myndin, sum eitur Melankoli er málað sum eitt minni um systrina Lauru. Hann hevði verið og vitjað hana ein sólskinsdag og upplivað hana í vónleysum myrkri. Hon leið av "sløvsind". Hon situr samansokkin í síni myrku verð. Tað gylta dagslýsið streymar inn gjøgnum stórar rútar. Á borðinum standa tvær blómur á einum eldreyðum dúki. Hvat vil Edvard peika okkum á í hesi mynd? Jú, hann vil siga okkum mótsetningar millum sólarljósið, tær frísku litirnar um hana og náttarmyrkið í henni. Hann kom til hana við blómum. Hon kendi hann ikki. Hon sat har uttan at røra seg og segði einki. Lívið, sum er ljósið og blómurnar, men sjúkan, sum systirin er fongd við, er døkka myrkrið, sum avspeglast í andlitinum.

## Edv. Munch um seg sjálvan

Edv. Munch hevði hetta í kjøtinum borið, at kenna snertin av sálarligum trupulleikum, sum ættin var fongd við, men sjálvur sigur hann: " Sjúka, vitloysi, ørskapur og deyði vóru teir svørtu einglar, sum vaktu við vøggu mína, og sum síðani hava fylgt mær gjøgnum lívið."

Ræðslan fyri sjúku - tuberklum og sinnisjúku og deyðsangist fylgdi Munch stórsta partin av ævi síni. "Hesar veikleikar vil eg hava inni við meg sjálvan. Hetta er ein partur av mær. Eg vil ikki hava sjúkdómin burtur, tí mikil er skuld mín til sjúkdóminí list míni."

Danski listamálarin, Ejnar Nielsen (1872-1956) var lærari hjá Mikenesi á listaháskúlanum í Keypmannahavn. Hann var millum annað symbolskur málari, hugsaði eins og Edv. Munch nógv um tilknýtið, sum menniskjað hevði til sjúku og deyða. Hann hevur eisini málað eina mynd, sum ber heitið: Sjúk genta(1880). Hesin listamaður og lærari hevði ávirkan á listina hjá Mykinesi, og høvdu teir brævaskiftið sínamillum, sum lýsir støðuna millum næming og lærara. Norski listamaðurin Carl Krogh hevur eisini málað eina



7. Savn (Sakn). 1934. 137 × 100 cm. Privateje.

sjúka gentu, sum situr í einum stóli. Hetta er systir hansara, sum hann hevur avmyndað, sum eisini doyði heilt ung. C. Krogh misti eisini foreldrini ungur, men var ikki so nógv merktur av hesum hendingunum í list síni. Hans Heyerdahl (1857-1913) málar Doyggjandi barn. Munch sigur: "Um tað sjúka barnið er at siga, at tú livdi við hesum í eini koddatíð."

Fleiri málarar mála sjúkt barn har bakgrundin er ein hvítur koddi. Allir tríggir listamenninir Munch, Krogh og Heyerdahl lata úr hondum hesar myndir, sum eina skygging av deyðans køldu hond, men ljósi livir í myndunum sum tað æviga ljósið. Koddin er glorian og bløðini(rósurnar), sum systir Krogh hevur í teimum foldaðu hondunum, er tekni um tað forgeingiliga, men í miðøldini var hesin boðskapur, at hesin persónur var eitt halgimenni. Eisini svenskarin Erns Josephson (1852-1906) og danskarin Michael Anker(1849-1927) hoyra til "koddamálararnar".

Edv. Munch kendi seg í síni listaligu gongd tætt knýttan at hesum myndlistamonnum.

## Endi

Her er so nógv at tríva í um hesa norðurlendsku listina, sum er ein ótømandi kelda. Eitt stríð, ein hólmgonga millum hold og anda í tjúkkum strokum hjá Munch og einari ílidnari Pieta av Mikinesi. Hann var drivin í sjúku - lungnabruna, meslingum og fiskahúð, men myndirnar frá tí døkku tíðini er klassisk ljóslist, har flaturnar eru mettaðar av littungum seiggi.

Mikines segði á einum sinni.... eg haldi tað er Karen Blixen, ið hevur sagt: "Lykke er smerter, der holder op"- so satt, so satt, og hóast tað hevði hon ongantíð havt psoriasis."

Eg gloymi aldri orð Mikinesar, har hann í eini sjónvarpssending segði um støðuna hjá sær 1978, meðan hann var innlagdur á eitt eldraheim, hugsi tað var: "Nu har de placeret mig imellem halvtossede mennesker!" Eitt sorgarljóð frá stórsta listamanni føroyinga, sum upp undir endan gekk í myrkri í sínum myndum og leitaði eftir tí fáliga ljósinum, sum skein ígjøgnum gluggan í myndum hansara: har sum ljós er, er vón fyri lívi.


*Keldur:*
*Mikines: Bárður Jákupsson*
*Ernst Mentze: S. Joensen - Mikines*

*Mennesket og kunstneren Edvard Munch av Ragnar Stange*
*Edvard Munch 1863 - 1944: Benedikt Taschen*
*Rolf Stenersen: Edvard Munch: Nærbilde av et geni*
*Inger Alver Gløersen: Den Munch jeg møtte*